# Mikkjalskvæði

1.
Kenna tit mannin í Beitinum búði,
sum yrkti um kappar í forum,
har pennur var brandur, og bókin skjøldur,
hann yrkti við nýtum orðum.

*Ei gloymast skal minni*
*Mikkjals her á Ryggi á sinni.*

2.
Hann sat har á tanga og eygleiddi alt,
ið hendi á bygdargøtum,
við brandi í hond og skjøldri við lið
á vallaðum grønum fløtum.

3.
Tá knørrur varð drigin úr knørraneysti,
og árarnar settar í sjógvin,
har homlurn gnadda í bæði borð,
tá brotini brutu um bógvin.

4.
Hann sat har á kletti við brandi í hond
og sá teirra kropnu hendur,
teir stríddust í líðum í dagsins yrki,
har brim bardi bygdarstrendur.

5.
Í bakkanum bjargaseyðurin gekk,
og fuglur í fuglabergi,
har bjargamaður í loftinum hekk,
hann stóð har og skoðaði verkið.

6.
Hann høgdi í klettin, so blóðið spríkti,
vælbrynjaður stóð hann ímóti
teir fornu stavir, teir standa stinnir,
hart fossurin fossar mót gróti.

7.
Frælsi og sjálvræði hjartað fylti,
væl lýst er í Føroyinga søgu
hann virdi teir gomlu og hevjaði teir
og bar teimum vakrastu kvøðu.

8.
Hann var har tá Brestir og Beinir fullu,
tá víkingar herjaðu landið,
tá bátar um kapp róðu grindarakstur
av havi at sløttum sandi.

9.
Hann skapaði list úr Føroya gróti
eins frægur og Tróndur á sinni,
hann vardi seg væl við brandi og spjóti.
Vit goyma hans skaldskap í minni.

10.
Legði hann undir seg landið alt
vid sínum vælvaldu orðum,
vakur var brandur, og skjøldur breiður,
vit ganga í hansara sporum.

11.
Vit eiga fongin at landi hann førdi
sum Sjúrðargull goymist í hjarta,
ein stoltleika her í Vágum nørdi
við sínum brandi bjarta.

12.
Æra vit minnið um Mikkjal reysta
og hansara samtíðarvarðar,
vit gleðast um gullið, hann okkum bar,
so leingi tað fløðir og fjarðar.

*Jóhannis Joensen*